# Neyðugt er at fáa skipaði viðurskifti viðvíkjandi førleikamenning av starvsfólki



Val X

**ALBIN JOHANNESEN**
Valevni fyri Miðflokkin

Nú hevur valstríðið staðið á í eina tíð, og eru lyfti um bæði eitt og annað givin til borgararnar her á landi. Nógv verður tosað um heilsuverkið, almannaverkið og skúlan.

Lat meg byrja við at staðfesta, at er eri samdur í, at hesi økini hava harðliga brúk fyri menning.

Heilsuskipanin í Føroyum skal mennast, soleiðist at einhvør kann kenna seg tryggan við ta viðgerð, sum givin verður í heilsuverkinum. Karmarnir skulu vera góðir, soleiðis at vit hava góð og væl útbygd sjúkrahús til at viðgera sjúklingum samstundis sum heimarøkt, røktarheim o.s.fr. eisini hava góða dygd. Viðgerðartrygd skal vera samstundis sum at sjúklingatryggingin skal setast á stovn.

Nógvir skúlar í Føroyum eru í syrgiligum standi og skal okkurt munagott gerast, soleiðis at vit kunnu lyfta okkum upp millum tey londini, sum hava besta skúlan í heiminum. Størri krøv skulu setast til læraraútbúgvingina og læraran, samstundis sum vit eisini mugu seta størri krøv til næmingin og heimið.

Innan almannaøkið skulu broytingar gerast, soleiðis at korini hjá einligum betrast. Barnafrádrátturin skal hækka frá 3 barni, soleiðis at tað ikki gerst tann fíggjarligi parturin sum heldur fólki aftur við at fáa fleiri enn 2 børn. Nýggj leigulóg skal setast í gildið og vit kundu hildið áfram at nevnt øki, sum eiga og mugu betrast.

Tá so øll hesi tingini eru nevnd, siti eg eftir við hesum spurninginum. Hvat við starvsfólkunum?

Vit hava eldsálir, sum hvønn dag taka stór tøk, fyri at hesi arbeiðsøki hanga saman, og skylda vit hesum fólkum eitt herðaklapp. Og skulu vit framhaldandi hava hesar eldsálirnar á arbeiðsmarknaðinum, mugu starvsfólkaviðurskiftini betrast munandi.

Innan øll hesi økið verður rópt eftir førleikamenning og starvsfólkamenning.

Taka vit skúlaøkið, er nógv hent seinastu árini, men spyrt tú Lærarafelagið, so er eitt mál, tey hava rópt serliga hart um seinastu mánaðarnar, nevniliga førleikamenning. Starvsfólkið vil meir enn fegin gera sítt arbeiðið til lítar, og tí er neyðugt, at vit stuðla teimum í hesum. Lat okkum taka læraran í álvara og seta pening av til umskúlan og eftir útbúgving av lærarunum, soleiðis at teir kunnu gera sítt arbeiðið til lítar. Menna vit læraran, vil næmingurin eisini mennast.

Í samrøðu við Rás2 hevur Marin Vang sjúkrarøktarfrøðis stjóri staðfest, at heilsuverkið manglar pening til førleikamenning av sínum starvsfólkum, soleiðis at tey á bestan hátt kunnu geva góða og professionella hjálp til sjúklingin og avvarandi.

Vit mugu fáa sett á stovn ein starvsfókapolitikk innan tað almenna, har tað skal arbeiðast við at menna starvsfólkið. Við menning fylgir ábyrgd og við góðum førleika er lættari at átaka sær ábyrgd.

Sum valevnið fyri Miðflokkin er mítt mál, at korini hjá teimum sum arbeiða innan heilsu-, almanna- og skúlaverkið skal betrast. Neyðugt er at fáa skipaði viðurskifti viðvíkjandi førleikamenning av starvsfólki, soleiðis at vit kunnu tryggja, at almenn starvsfólk hava bestu fyritreytirnar fyri at virka í teirra starvi. Hesi viðurskifti eru eftirhondini ein sjálvfylgja innan ta privatu vinnuna, sum arbeiðir nógv við starvsfólkamenning. Átti tað almenna ikki eisini at fylgt við á hesum økinum? Er hetta ikki ein partur av tí “rúmliga” arbeiðsmarknaðinum?

# Neyðugt við hugburðsbroyting á umhvørvisøkinum



Val X

**JASPUR LANGGAARD**
Miðflokkurin

Miðflokkurin ynskir, at umhvørvisdálkingin verður tikin í størri álvara og at størri dentur verður lagdur á at fyribyrgja dálking.

Vit kunnu freistast at siga, at nú vendist ikki aftur, hjólini koyra so skjótt, og tað er onki vit kunnu gera, fyri at tálmað gongdini innan umhvørvisdálking.

Síðstu tíðina hevur nógv verið tosað um umhvørvisbroytingar, ið síggjast kring allan heim. Ein rapport frá ST staðfestir, at broytingarnar í veðurlagnum nú stava frá dálking, skapt av menniskjum, og hetta er nakað sum vit í Miðflokkinum ikki kunnu liva við.

Politiskt hevur hetta mál verið á skránni tey síðstu 20 árini, men persónliga má eg siga, at eg dugi illa at síggja álvaran aftan fyri hesi orð/lyfti. Nú er tíðin komin at vit mugu gera nakað ítøkiligt – orðini føra okkum ikki á mál.

Loysnin er, at vit gera tiltøk sum minka um útlátið/dálkingina her og nú, samstundis sum vit seta fokus á menningarætlanir sum tryggja varandi loysnir, eisini um hesar í fyrstu atløgu koma at kostað – sum er hava vit ikki ráð at lata vera.

Skulu vit røkka hesum málum, er neyðugt við einari politiskari hugburðsbroyting. Hesa avbjóðing tekur Miðflokkurin í størsta álvara. Vit hava fingið til uppgávu at umsita skaparverkið við skynsemi, soleiðis at komandi ættarlið eisini kann fáa gleði av tí tilfeingið, ið Skaparin hevur givið og gevur okkum hvønn dag.

Eitt mál sum Miðflokkurin hevur sett sær, er at vit tey næstu 10 árini er, vilja minka útlátið við 30%, í mun til støðuna í dag.

**Set X við Miðflokkin**

# Orð hava týdning



Val X

**NITA NÆS**
Javnaðarflokkurin

Síðan eg var smágenta, havi eg havt áhuga fyri, hvussu vit samfelagsliga innrætta okkum.

Sjálv havi eg ongantíð ivast í, hvar eg politiskt hoyri heima. Eg havi verið limur í Hvalbiar Javnaðarfelag, síðan eg var 18 ár. Og tá okkara felag legði saman við Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag, gjørdist eg limur har. Eg havi altíð havt stóran áhuga fyri samfelagsviðurskiftum, og havi sett mangan kritiskan spurning til politiskar samfelagsloysnir, sum samgongur og andstøður millum ár og dag hava staðið fyri.

Fyri meg í dag kennist tað sum ein løtt avgerð at stilla upp fyri Javnaðarflokkin. Flokkurin hevur somu hugsjón, sum hann fyri 80 árum síðani varð stovnaður á. Og eg vil halda rimmar fast um, at tað er við javnaðarhugsjónin vit hava vunnið stórar sigrar og framá í Føroyum. Samhaldsfestið hevur givið einum stórum meiriluta av fólkinum betri lívskor, økta vælferð og fjøltáttaðar møguleikar at mennast.

Í nútíðar vælferðarsamfelagnum merkir samhaldsfesti, at meirilutin skal vera við til at tryggja øllum somu atgongd til øktu vælferðina. Øll tey, sum eru væl fyri í samfelagnum, eiga at sýna samhaldsfesti fyri teimum ymisku veikaru bólkunum. Hetta skulu tey, tí vit vilja hava eitt samfelag í sosialari javnvág.

Tað, at allir flokkar í dag eru farni at tosa út frá einari sosialdemokratiskari grundhugsjón, er sjálvsagt at frøast um, eg ivist tó í, um tað er tann sama vælferðin, sum vit tosa um. Tí um tað ikki er tað, so vinna vit ikki serliga langt framá ----- heldur ikki eftir hetta valið.

Tí vil eg minna okkum øll valevni á, nú fáir stríðsdagar eru eftir: At orð hava týdning!

# Tjóðpallur Føroya dettur sundur



Val X

**JÓNGERÐ NIELSEN**
Javnaðarflokkurin

Hølisviðurskiftini hjá Tjóðpalli Føroya eru út av lagi vánalig.

Ein partur av okkara mentan er kanska við at doyggja?

Kunnu vit standa á síðulinjuni og hyggja at? Nei eg haldi ikki.

Vit kunnu sum borgarar í hesum landið ikki góðtaka hesar vána umstøður.

Eg vil á tingið arbeiða fyri, at betra umstøðurnar hjá øllum teimum sum eru við til at fasthalda og menna okkara listarfólk og okkara mentan.

Vit skulu í framtíðini eisini hava møguleika til, at njóta gott av okkara evnaríku listarfólkum. Men um hetta skal verða ein møguleiki á Føroya landið í framtíðini, má hetta økið raðfestast.

Eg vil gera mítt til at listin og mentanin tey komandi 4 árini, verður raðfest. Ikki bert á pappírinum, men ítøkiliga hækka játtanina til mentunarøkið, soleiðis at umstøðurnar hjá okkara listarfólkið verða maksimalar. Tey skulu hava góðar arbeiðsumstøður at virka í, og teir fysisku karmarnir skulu verða nøktandi.

Vit eiga nógv evnarík listarfólk, innan tónleik, sjónleik, málningarlist, sniðgevar o.a. Um vit framhaldandi skulu hava ágóðan av listarligum tiltøkum av ymsikum slag, so skulu vit eisini geva teimum neyðugu umstøðurnar at virka undur.

Eitt land sum Føroyar við ríkari mentan, eigur at raðfesta hetta økið frammliga.

Við ynski um eina bjarta framtíð innan mentunarliga økið í Føroyum.

**Set tín x
við meg á lista C**